Terry fær metløn

Liðskiparin hjá Chelsea, John Terry, verður nú helst best løntir spælarin í søguni hjá enskum fótbólti. Sum skilst, so hevur Chelsea nýggjan sáttmála kláran til verjuálitið, og er vikulønum í sáttmálanum ikki minni enn 1.45 mió kr. Ein upphædd, sum yvir tey fýra árini, sum yvir fýra ár gevur eina samlaða løn upp á ikki minni enn 300 mió kr. Til sammetingar kann nevnast, at menn sum Drogba ,Ballack og Shevchenko "bert" fáa 1,35 mió kr. um vikuna.

Fimm kappast um at verða ársins

Daniel Agger, Jesper Christiansen, Michael Gravgaard, Thomas Kahlenberg og Christian Poulsen eru tey fimm nøvnini, sum kappast um at verða ársins spælari í donskum fótbólti 2006. Sjálv handanin fer fram á stóra DR-show'inum, sum verður 6. januar, men tað stendur so greitt, at tað verður ein av hesum fimm, sum fær heiðurin sum besti danski fótbóltsspælarin í 2006.

Kyndil-Neistin 23-23 (11-13):

Kyndil skapti hálva sensatión

Kyndilskvinnurnar prógvaðu fyri grannunum, at tær eru nakað væl tyngri at syfta í ár, enn tær hava verið seinnu árini

HONDBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Seinastu árini hevur tað sjáldan verið nakar sum helst ivi, tá Kyndil og Neistin hava tikist á kvinnusíðuni. Hóast Kyndil blómaði nakað stutt undan aldarskiftinum, so hevur Neistin síðani sitið á øllum í høvuðsstaðnum.

Lina Andriulyte og hinar í Kyndli tykjast av álvara at vera á beinari kós. Sunnudagin iðraðu tær seg um, at talan ikki gjørdist um tvey stig móti Neistanum, sum annars hevur vunnið allar grannauppgerðirnar í fleiri ár

Mynd: Álvur Haraldsen

Stillaðu nervarnar

Og tað tóktist eisini, sum skuldi hetta gerast úrslitið, tá fyrri hálvleikur varð spældur sunnudagin. Neistin spældi við tolni, har bíðað varð eftir mistøkum frá Kyndli, og so vórðu hesi aloftast revsað í kvikum kontra-álopum.

Og hetta riggaði eisini fínt. Ikki minst, tí Kyndil í álopinum framdi fleiri óprovokerað mistøk, og so gekk tað ofta skjótt hinvegin.

Sum so hevði Neistin onga orsøk at broyta nakað, tá tær komu út eftir steðgin, men Kyndil hevði nú stillað sínar nervar, og so broyttist dysturin. Fyrst og fremst tí Kyndil nú gav sær neyðugu stundirnar í álopsspælinum, har tær bíðaðu eftir møguleikanum, heldur enn at skunda alt ígjøgnum. Men eisini tí Guðrun í Lágabø rættiliga tíðliga hevði tvær framúrskarandi dupultbjargingar, sum av álvara góvu álopsspælarunum hjá Neistanum nakað at hugsa um.

Bjargaðu sær við brotskasti

Støðan var nú skiftandi, men seianstu minuttirnar tóktist tó, sum hevði Kyndil betra takið. Við Loinu Andriulyte mitt fyri og Brynhild Klein á veinginum kundu tær nú spæla bæði djúpt og breitt, og tað hóvaði avgjørt ikki Neistanum. Og uttan at taka nakað frá Erlu Eliasen, so tóktist tað merkisvert, at Neistin allan dystin helt Fríðu Petersen á beinkinum. Ikki minst, tá tað ivaleyst vildi komið væl við hjá Erlu, um hon hevði fingið onkra lítla fríløtu.

Tað ber sjálvandi ikki til at staðfesta, hvørt hetta vildi broytt nakað, men í øllum førum slapp Neistin at sveitta væl og virðiliga. Tí Kyndil vildi ikki sleppa takinum, tá Neistin fór í seinasta álopið, stóð enn 23-22 á talvuni. Tað eydnaðist tó evstu løtu at vinna eitt brotskast til tær bláu, og so hevði Nicoleta enn einaferð nervarnar til at halda høvdið kalt. Og sjálvt um javnleikurin avgjørt var minni enn tað, sum Neistin ætlaði sær burtur úr dystinum, so merkir hetta fyribils, at tær fingu stig burturúr. Og verður hetta einasti javnleikurin í grundspælinum, so er stigamissurin jú eingin.

Vunnu á ivanum

Í so máta var talan um øðrvísi støðu hjá Kyndli, sum longu hevur spælt javnt í hesum árinum. Tí mistu tær í veruleikanum stig við úrsliinum, og tí vórðu tær kanska størstu tapararnir, tá Nicoleta sendi brotskastið inn.

Men júst tann veruleikan skal Kyndil kanska ikki hugsa so nógv um her og nú. Fyrst og fremst, so sýndi liðið, at tær ikki verða syftar uttan víðari. Og megna tær at byggja víðari á tann veruleikan, kann nógv verða vunnið.

Fakta um dystin

Kyndil-Neistin 23-23 (11-13)

Málskjúttar

Kyndil: Lina Andriulyte 5, Anja Heinadóttir 5, Brynhild Klein 4, Jacklyn Durhuus 3(1), Randi S. Wardum 3, Kari Ann Petersen 1, Vesna Tomajek 1

Neistin: Nicoleta Radu Hansen 10(2), Katja Eigemann 7, Ása á Neystabø 2, Annika Thomasen 2, Heidi Maria Akselsen 1, Rakul Augustinussen 1

Brotskøst: Kyndil 1, Neistin 3

Útvísingar: Kyndil 4, Neistin 3

Dómarar: Kartin Joensen & Kristian Joensen

Hópur av flogferðum frá Atlantic

Tíggju flogferðir hjá Atlantic Airways vóru at vinna, tá punktum varð sett fyri fótbóltsárinum í Miðlahúsinum

KAPPINGAR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Nú kappingarárið er av, varð lutur eisini kastaður um fleiri flogferðir frá Atlantic Airways. Hetta eru ferðir, sum vóru settar sum vinningar til kappingini "Hvar er bólturin", sum hevur verið í blaðnum hetta kappingarárið.

Ikki færri enn 10 flogferðir funnu nýggjan eigara sunnukvøldið, og kunnu hepnu og dugnaligu vinnararnir fáa vinningar sínar við at venda sær til Sosialin

Kappingin hevur verið skipað soleiðis, at vit í Sosialinum hava havt fleiri myndir, har bólturin er tikin úr myndini. Uppgávan hjá lesarunum hevur so verið at gita, hvar bólturin er, og er hetta gjørt við hópatals SMS-boðum, sum eru send gjøgnum árið.

Og nú er so lutur kastaður um tær átta ferðirnar, sum vórðu at vinna. Hartil fáa vinnararnir av tippingarkappingini hjá Sosialinum og Formula.fo nú eisini sín vinning. Teir báðir vinnararnir, sum nú fáa vinningin, eru teir, sum dugdu best at gita úrslitini í HM-kappingini í summar og í Formula-kappingini í ár. Longu nú er næsta kappingin fult ígongd, og er tað her Champions League fótbóltur, sum gitt verður um.

Til samans eru tað sostatt 10 flogferðir frá Atlantic, sum vórðu lutaðar burtur, og eru vinnararnir hesir:

Hvar er bólturin

Janus Dragasund,
Lítlatrød 8, Tórshavn

Annika Fríða Wardum,
Streymnes

Ragna á Plógv,
Nesavegur 29, Sandavági

Anita Arge,
Høvdagøta 10, Argir

Jónfríð Jacobsen,
Bakkavegur 13, Fuglafirði

Anja Egholm,
Varðagøta 3, Tórshavn

Hans Lyngsø,
undir Borgarhálsi, Velbastaður

Eydna Berg,
undir Heygnum 25, Tórshavn

Bestu tippararnir

HM-kappingin
1 Róaldur Jacobsen
2 Rúni Mortensen
3 Regin Sivertsen
4 John Michael Petersen
5 Áki Anderasen
6 Ragnar Háskor
7 Jákup Ósá
8 Magnus Simonsen
9 Súsanna Danielsen
10 Hans Pauli Joensen

Formula-kappingin
1 Regin Davidsen
2 Jóhan Heinesen
3 Áki Johansen
4 Sanna Djurhuus
5 Høgni Davidsen
6 Kim Olsen
7 Hans Pauli Joensen
8 Heri Ósá
9 Allan Dal-Christiansen
10 James við Brúgv